gult cyan magenta svart



# Heldur nýggjan skúla í Suðuroy enn í Havn

*Tað er ímóti øllum tilráðingum at økja um virksemið í miðstaðarøkinum. Tí er ætlanin at byggja studentaskúla og skúladepil í Havn løgd til viks fyribils*



*Studentaskúlin í Suðuroynni húsast undir sera vánaligum umstøðum, men tað er tað ætlanin at gera nakað við nú. Á tíggju ára verklagsætlanini hevur Karsten Hansen skotið upp at seta 21 milliónir av til at byggja skúlan út fyri. Hinvegin má ætlanin at gera nýggjan studentaskúla í Havn bíða nøkur ár enn*

ÁKI BERTHOLDSEN

Studentaskúlin í Suðuroynni hevur allar dagar húsast undir sera vánaligum umstøðum.

Men nú kemur broyting í, tí nú skal hann hava munandi betri umstøður.

Á tíggju ára verklagsætlanini, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum nú er komin væl áleiðis við, og sum er umrødd aðrastaðni í blaðnum, hevur hann m.a. skotið upp at seta 21 milliónir av til at bøta um hølisviðurskiftini hjá studentaskúlanum í Suðuroynni.

Karsten Hansen sigur, at hann hevur skotið upp at seta tær 21 milliónirnar av yvir trý ár, tvs. í 2002, 2003 og 2004.

Annars er ætlanin at brúka næsta ár til at projektera eina byggiætlan í.

Karsten Hansen sigur, at hann veit ikki, hvussu nógvur skúli fæst fyri 21 milliónir.

Men fyri 21 milliónir skuldi tað í øllum førum borið til bygt soleiðis, at tað bleiv eitt rættiliga stórt framstig afturímóti tí skúlanum, sum er í dag.

– So mugu tey, sum vara av skúlanum, finna útav, um tey byggja nýtt, ella um tey byggja upp í skúlanum, sum er.

í løtuni húsast studentaskúlin í Suðuroynni í trimum húsum í Vági.

Hann heldur bæði til í hølum í Vágs Skúla og í hølum í gomlu kommunuskrivstovuni, sum er sera illa farin.

Harumframt varð eisini gamla posthúsið í Vági bygt um til studentaskúla fyri nøkrum árum síðani.

### Bíða við Havnini

Samstundis er tað greitt eftir 10 ára verklagsætlanini, at ætlanin at byggja nýggjan skúladepil í Marknagili við m.a. studentaskúla, verður av ongum tey fyrstu árini.

Karsten Hansen sigur, at tað hóskar væl inn í endamálið fyri fíggjarpolitikkinum at byggja skúlan í Suðuroy, heldur enn í Havn

Eitt týðandi endamál við ætlanini er at brúka alment virksemi til at stýra búskaparligu gongdini í samfelagnum við.

Sostatt skulu vit seta almenn arbeiði ígongd, í økjum, har virksemið er ov lítið frammanundan fyri at seta gongd aftur á búskapin.

Hinvegin skulu vit halda aftur í økjum, har virksemið er nógv frammanundan fyri ikki at skunda undir, at búskapurin verður ov heitur.

– Í so máta er tað væl hóskandi at seta arbeiði ígongd í Suðuroynni, tí kann tað gerast, uttan nakran sum helst vanda fyri ovurhiting.

– Har er tað eisini harðliga tiltrongt, tí í fyrstu syftu hevur skúlin avgjørt brúk fyri betri umstøðum, men ikki minst hevur byggivinnan tørv á meiri virksemi í oynni, sigur Karsten Hansen.

– Hinvegin er tað ímóti øllum tilráðingum frá búskaparfrøðingum at økja um virksemið í Havnini, tí tað er so nógv virksemi í høvuðsstaðnum frammanundan.

Hann sigur, at í nýggju verklagsætlanini hevur hann skotið upp at byrja at seta pening av til nýggjan studentaskúla í Havnini í 2004.

– Men tað veldst alt um, hvussu útlitini eru tá.

## Viðmerking:

# Fullveldismálið

Virðiligt mál – óvirðilig amboð – men, målet helliger midlet, siga danir?

Løgtingsmaður fólkafloksins í Eysturoy sigur í Dimmalætting í dag, at hann og samgongan hava eina virðiliga søk at stríðast fyri, nevniliga at taka fulla ábyrgd av øllum føroyskum viðurskiftum.

Men er hetta nú so? Tá ein tekur fulla ábyrgd av sínum viðurskiftum, so gjaldar ein eisini fult út fyri síni viðurskifti. Og um so er, so er ikki nógv at klandrast við danir um? Hetta stríðið – hesar samráðingar eru sera óvirðiligar – mangur føroyingur bæði her heima og í útlondum skammast og krimpar tærnar framman fyri skerminum. Tað er ser óvirðiligt, tað sum fer fram í løtuni, tí vit vilja veruliga slett ikki taka fulla ábyrgd – hví, tí vit eru ikki førir fyri at gjalda alt.

Hetta er eisini í tráð við tað, sum tær nógvu kanningarnar, sitandi samgonga gjørdi, komu fram til. Harvið eru vit heldur ikki tilreiðar at taka nakað fullveldi ella nakra loysing her og nú.

Besta dømi her um var avtalan millum danir og sitandi landsstýri frá 1998, tá tryggjaðu fullveldisfólkini sær fullan og vaksandi blokkstuðul í trý ár fram. Hví?

Prísurin fyri hetta sokallaða fullveldi er umframt pengarnar og harvið fallandi livistøðið, at vit ikki vita, hvat hendir við:

okkara rættindum í Danmark, okkara moneteru viðurskiftum, okkara rættarskipan og hinum málsøkjunum, sum vit skulu yvirtaka og gjalda fyri í einum. Øll uttanlandstænastan?

Og hvør sigur, at drotning dana vil vera Føroya drotning? Hví eru republikanar í fimti ár nú vorðnir kongatrúgvir? Og teir, sum gingu sktrúðgongu móti Mjørkadali í fleiri ártíggju, teir vilja nú melda okkum sum lim av NATO? Er tað løgi, ein undrast?



Nei, latið okkum sjálvar fyrst gera fyritreytirnar her heima fyri fullveldi og møguligari loysing, tað er at gera búskapin sjálvberandi, og vísa, at vit megna at umsita tað á mannsømiligan hátt, og megna at gjalda tað, tað kostar. Tá kunna vit biðja um sjálvstýri uttan skiftistíð – veruligt sjálvstýri, um Føroya fólk ynskir tað.

Í løtuni er sáað split millum okkum føroyingar og millum okkum og danir, og tað er lítið virðiligt. Men danir hava orðatakið: Målet helliger midlet.

Vælsignaðir, takið tykkum saman og finnið eina betri loysn, tí hendan verður okkum dýr og kemur okkum aftur um brekku í gráum kálvskinni.

Hetta er ein lítið virðilig støða, sum vit beint nú eru í, tað er heilt vist, og ótryggleikin millum føroyingar er stórur, tó at vit hava góða veiðu og góðan fiskaprís.

**Birgir Mohr**
**Sandi**

# Admiral Watsons cirkus

Ganske kort om hr. Watson, for han er ikke mange ord værd. Men det er nu sådan, at når der kommer cirkus til by, følger der altid en klovn med – så hvorfor ikke osse hér.

Derfor var det glædeligt, at grindeformanden og andre manede til besindelse overfor både presse og os andre, om ikke at rode for meget op i denne pirats gøren og laden. Derfor kan det undre, at journalist, Høgni Mohr fra Sosialurin, skrev en artikel d. 7. juli, hvor han gør alt for at »yppe kiv« i denne sag. Han skriver bl.a.: »Ein politiskur eygleiðari sigur við Sosialin, at...« og så følger der lidt antidansk ævl og senere står der: »Ein annar eygleiðari sigur, at støðan kundi týtt upp á, at danir...« og så følger der igen noget antidansk ævl. Og så slutter Høgni af med: »Bæði Paul Watson og Poul Nyrup ætla at brúka føroyingar til at røkka sínum endamálum, vil hesin eygleiðarin vera við.« Det kan opfattes som om det nu også er Nyrup der er skyld i piratens tilstedeværelse.

Kære hr. journalist. HVEM er disse mystiske politiske iagttagere? Du lægger op til mistanke mod alle, og det kan ikke være en seriøs journalists opgave. Er det din fornavnebroder eller er det lagmanden eller måske Zakarias eller Tórbjørn – eller sku det monstro være Heine O. Du lægger op til sådanne mistanker mod alle hæderlige personer. Er du tilhænger af anonyme læserbreve, hvor alle kan genere alle uden at lægge navn til? Eller er det noget, du sådan bare sidder og finder på? Eller måske synes du, at dit fornavn »forpligter«.

Vi læsere har ret til at vide, hvem det er I skriver om og hentyder til i avisen. Vi har KRAV på at vide det, for vi betaler penge for at læse, hvad I skriver.

Havde det været en bemærkning fra det store udland, kunne det være ligegyldigt, hvad han eller hun hedder – men ikke hér.

De, der har sagt mindst om denne hændelse, er de danske myndigheder her på Færøerne, hvorimod pressen næsten har berettet for os, hvilket skonummer denne pirat bruger og hvilken farve hans underbukser har, hvorimod Høgni Mohrs politiske iagttagere nærmest er gået amok, ved at blande Nyrup, Hvidbjørnen og politik op i sagen. Endvidere undrer han sig over, at marinestationen hver måned sender en pressemeddelelse til aviserne heroppe med en kort statistik over deres arbejde. Noget jeg har opfattelsen af, de har gjort alle de 15 år jeg har boet her. Og hvad har det iøvrigt med Watson at gøre?

Prøv at læse din artikel igen, Høgni Mohr, og især afsnittet: »Nyrup vísir seg...« og erkend at det er noget journalistisk 3. kl. arbejde, navnlig af den årsag, at du ikke anfører, hvem disse politiske iagttagere er, for vi læsere gider ikke betale for sådanne (måske) hjemmestrikkede historier.

Prøv også at læse, hvad Atli Dam skrev i jeres blad d. 11. juli. Nogle af hans citater: »Vit vita, at donsk verjuskip eru og skulu vera í Føroyum. Og tað er gott, at tey eru tøk.« Og senere siger han: »Tað er ikki danska sjóverjan, sum hevur geilað nakað upp, heldur er tað føroyska pressan, sum hevur bitið á ongulin hjá Watson.«

Nu er Watson jo sejlet væk med sit cirkus, men skulle han komme igen, lad så være med at give Nyrup og alt der er dansk, skylden for det. Ligeledes bedes du holde begrebet FULLVELDI udenfor.

**Aksel Krogh**

gult cyan magenta svart



# Útbyggingar fyri 1,6 milliard í Føroyum tey næstu 10 árini

*Karsten Hansen, Landsstýrismaður í fíggjarmálum, fer í næstum at leggja eina tíggju ára útbyggingarætlan fyri føroyska samfelagið fram. Útbyggjast skal fyri 160-170 milliónir um árið og tað eru nógv stór verkløg á skránni*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur nú gjørt eitt uppskot fyri, hvussu føroyska samfelagið skal byggjast út tey komandu 10 árini. Hann ætlar, at verklagsætlanin skal koma í gildið longu frá næsta ári at rokna og hann ætlar at fáa so stóra undirtøku fyri henni í tinginum sum gjørligt*

Tey næstu 10 árini skulu útbyggingar gerast í føroyska samfelagnum fyri einar 1,6 - 1,7 milliard tilsamans.

Tað er í hvussu so er ætlanin hjá Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum.

Hann er nú komin væl áleiðis við at gera eina 10 ára verklagsætlan fyri, hvussu føroyska samfelagið skal byggjast út tey næstu 10 árini.

Hann sigur, at líka neyðugt, sum tað alsamt er at byggja landið út , líka neyðugt er tað, at hetta fer fram undir væl skipaðum viðurskiftum, tí hevur hann lagt eina nágreiniliga ætlan fyri, hvussu hann heldur, at hetta skal gerast næstu 10 árin.

Talan er sjálvsagt bara um verkløg hjá landskassanum.

Vit hava fyrr umrøtt, at kommunurnar skulu gera eina verklagsætlan, sum skal ganga yvir fimm ár, og sum skal fevna um tær kommunalu útbyggingarnar.

Karsten Hansen sigur, at verklagsætlanin er løgd eftir samfelagsbúskapinum, sum hann er í løtuni.

– Tað, sum vit hava skotið upp, er at byggja út fyri 160-170 milliónir um árið, tí tað halda vit er tað, sum er ráðiligt, sum støðan er.

– Men sjálvandi kann ætlanin broytast bæði uppeftir og niðureftir, alt eftir, hvussu gongdin annars er í samfelagnum. Tí er ætlanin, at hon skal endurskoðast hvørt ár.

### Mest í útjaðaranum

Landsstýrismaðurin sigur, at roynt verður at býta útbyggingarnar sundur ímillum tey ymsu økini.

Men hann leggur eisini dent á, at tað er ein týðandi táttur í útbyggingarætlanini, at hon í stóran mun verður brúkt til at stýra virkseminum í teimum ymsu pørtunum í landinum og at mest tískil verður gjørt í økjum, har lítið virksemið er frammanundan, og har lítil og ongin vandi er fyri, at tað almenna virksemið, sum hesar útbyggingar føra við sær, fara at gera búskapin ov heitan.

Hinvegin hevur tað samstundis týdning at halda aftur í miðstaðarøkinum, har nógv arbeiðið er frammanundan og har almenn arbeiði fara at føra við sær at búskapurin verður enn heitari, enn hann longu er.

–Men tað ber kortini ikki til at renna undan veruleikanum. Og veruleikin er, at eisini í miðstaðarøkinum eru tað ymisk arbeiðið, sum vit heilt einfalt ikki sleppa undan at fara undir nú, sigur Karsten Hansen.

Hann sipar ikki minst til Landssjúkrahúsið, sum er fullkomiliga illa fyri og afturútsiglt.

–Tað er eitt ódnartak at fáa Landssjúkrahúsið á føtur aftur. Men tað er eitt tak, sum vit mugu undir nú, hóast tað stríðir ímóti endamálinum at brúka almennu verklagsætlanina sum eitt týdningarmikið lið í royndunum at stýra gongdini í búskapinum.

### Stóra undirtøku

Karsten Hansen sigur, at hann miðjar ímóti at fáa so stóra undirtøku fyri verklagsætlanini sum gjørligt.

Tí hevur hann eisini lagt hana fyri andstøðuna.

Hann sigur, at ein fundur hevur verið við andstøðuna um ætlanina og at tað var ein góður fundur.

– Sjálvandi verða tøl broytt aftur og fram, so hvørt sum tann politiska viðgerðin gongur sína gongd.

– Men tað er umráðandi, at vit fáa so stóra undirtøku sum gjørligt fyri verklagsætlanini sum gjørligt, fyri at vit kunnu hava toliliga vissu fyri at ætlanin fer at halda, so at hon ikki verður meiri ella minni tilvildarliga broytt, at eftir, hvør kemur í samgongu.

–Men tað er eisini umráðandi, at vit ikki víkja frá sjónarmiðnum um at brúka verklagsætlanina sum eitt amboð at stýra búskapinum við, so at almennar útbyggingar ikki eru við til at skunda undir eina óhepna búskaparliga gongd, har búskapurin er ov heitur.

– Heldur skulu vit brúka tær til at venda gongdini í økjum, har ov lítið virksemið er frammanundan, sigur Karsten Hansen.

# Nærum 400 milliónir til Landssjúkrahúsið

*Stórar útbyggingar skulu gerast á Landssjúkrahúsinum tey komandu árini*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tey næstu 10 árini skal Landssjúkrahúsið byggjast út og byggjast um fyri næstan 400 milliónir.

Tað er ein partur av teirri 10 ára verklagsætlanini, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum arbeiðir við í løtuni.

Hann sigur, at Landssjúkrahúsið er fullkomiliga afturútsiglt og er sera illa fyri, bæði til høli og til útgerð.

–Tað er eitt ódnartak at fáa Landssjúkrahúsið á føtur aftur. Men tað er eitt tak, sum vit mugu undir nú, hóast tað stríðir ímóti endamálinum at brúka almennu verklagsætlanina sum eitt týdningarmikið lið í royndunum at stýra gongdini í búskapinum. (Sí greinina omanfyri.)



*Landssjúkrahúsið er fullkomiliga afturútsiglt og krevur øgiligar ábøtur tey næstu árini. Tað má bara gerast, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum*

Karsten Hansen sigur, at tær um- og útbyggingar, sum eru neyðugar at gera á Landssjúkrahúsinum eru so umfatandi, at hann skjýtur upp at seta ikki færri enn næstan 400 milliónir av til endamálið á 10 ára verklagsætlanini.

Játtanin verður býtt sundur ímillum øll árini, tó verður mest sett av tey fyrstu árini.

Harafturat standa 10 milliónir á fíggjarlógini fyri í ár til útbygging á Landssjúkrahúsinum.

Karsten Hansen sigur, at m.a. skjýtur hann upp at seta runt roknað seks milliónir um árið, ella 60 milliónir tilsamans, til tól og útgerð. Hendan játtanin er sjálvandi til øll trý sjúkrahúsini, men tað er Landssjúkrahúsið, sum fær bróðurpartin av henni.

Karsten Hansen sigur, at tilsamans skjýtur hann upp at seta tilsamans 428 milliónir av til heilsumál í hesum 10 ára skeiðnum.

Hann sigur, at ætlanin er síðani, at Almanna- og Heilsumálastýrið skal gera av, hvussu peningurin verður brúktur best møguligt.

Hann sigur, at hann ivast ikki í, at uppskot hansara viðvíkjandi Landssjúkrahúsinum vinnur frama. M.a. at tað fleiri ferðir týðiliga er komið til sjóndar í Løgtinginum, at stór semja er um, at Landssjúkrahúsið skal raðfestast ógvuliga frammaliga komandu árini.

*Orðabókin:*

## Ein løga er eitt verklag

Tað er skjótt at fløkjast í øllum teimum mongu hugtøkunum, sum koma fram ímillum ár og dag.

Ikki gjørdi landsins myndugleikar fløkjuna minni, tá ið teir, í sambandi við fíggjarlóg o.a., brádliga fyri stuttum fóru at tosa um „løgur“ og „løgujáttanir“. Vit hava skilt, at hetta skuldi eitast at vera føroyska orðið fyri tað, sum á donskum eitur „anlæg“. Nú hevur málnevndin víst á, at hon heldur hetta vera óheppið málbrúk.

Heldur skjýtur hon upp at kalla eitt „anlæg“ fyri eitt „verklag“

Sostatt skal tað eita verklagsætlanir og verklagsjáttanir. Ein íløga er framvegis tann peningur, sum verður settur í eitt virkið fyri at fáa avkast av honum.